ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

19. mars 2021
Mál: 21/00091-3
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Heri Petersen

Nr. 096/20

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um sjúkradagpening til sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í smáum fyritøkum, settur landsstýrismanninum við almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar møguleikar hava stjórar í smáum fyritøkum at fáa sjúkradagpening?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at ávikavist sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í smáum fyritøkum eru nóg væl tryggjað, tá tað kemur til mista inntøku í sambandi við sjúku?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um endurskoða dagpeningalógina til tess at tryggja, at eingin dettur niðurímillum?

Viðmerkingar:
Sambært § 3 í dagpeningalógini kunnu vanligir løntakarar, sjómenn, útróðrarmenn og sjálvstøðug vinnurekandi, sum ikki ella í lítlan mun hava leysa arbeiðsmegi afturat sær, umframt persónar, sum tekna eina sjálvbodna trygging eftir kap. 7 í dagpeningalógini, fáa dagpening í sambandi við mista inntøku ella trygging, um tey verða sjúk ella skadd.

Fleiri detta tó niðurímillum. Tað eru til dømis stjórar í smáum fyritøkum, sum vanliga høvdu verið sjálvstøðugir vinnurekandi, men sum hava stovnað eitt felag so sum smápartafelag. Undanfarni landsstýrismaður við almannamálum, Eyðgunn Samuelsen, bøtti um hesi viðurskifti við at leggja fram uppskot um at víðka dagpeningaskipanina til at fevna um stjórar í egnum felag við tí treyt, at felagið ikki ella í minni mun hevði arbeiðsmegi afturat sær. Løgtingið samtykti uppskotið í mai 2017[1]. Í hesum sambandi varð vist á, at talan var um eina varisliga broyting, og at lógin átti at blivið endurskoðað tvey ár seinni. Tað eru nú fýra ár síðan broytingarnar, og enn eru tær ikki endurskoðaðar. Stjórar í smáum fyritøkum, sum hava nakað av arbeiðsmegi afturat sær, detta sostatt framvegis niðurímillum við tað, at teir ikki eru fevndir av lógini um sjúkradagpening. Hetta hevur við sær, at stjórar í smáum feløgum ofta liva í støðugum ótta fyri at gerast sjúkir, tí tað kann raka felagið og starvsfólkini í felagnum meint. Somuleiðis kann tað halda summum frá at átaka sær stjóraheitið í so smáum fyritøkum, tá hetta í nógvum førum í størri mun er formalitetur enn nakað annað.

Fyri at fáa greiðu á, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at taka fleiri stig til tess at bøta um viðurskiftini hjá smáum vinnurekandi, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi 8. mars 2021

Aksel V. Johannesen

[1] (84/2016 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.).

Svar

1. ***Hvørjar møguleikar hava stjórar í smáum fyritøkum at fáa sjúkradagpening?***
   Sum spyrjarin ger vart við í viðmerkingunum til spurningin, so eru stjórar í smáum fyritøkum, sum kunnu koma fíggjarliga illa fyri í sambandi við sjúku. Ein sjálvstøðugur vinnurekandi, sum ikki hevur arbeiðsmegi aftrat sær, ella bert í lítlan mun hevur leysa arbeiðsmegi aftrat sær, er beinleiðis fevndur av løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. Tað merkir, at hann hevur rætt til dagpening í sambandi við lønarmiss orsakað av sjúku. Lønarmissurin verður roknaður við støði í seinast álíknaða inntøkuárinum.

   Tann sjálvstøðugi vinnurekandi kann eisini tekna seg til sjálvbodnu tryggingina hjá Almannaverkinum. Eisini sjálvstøðug vinnurekandi, sum hava arbeiðsmegi aftrat sær, kunnu tekna seg til tryggingina. Hann, sum hevur teknað trygging, hevur í sambandi við sjúku rætt til hægstu dagpengaveiting frá fyrsta fráverudegi.

   Um virksemið er skipað í einum felag, t.d. einum smápartafelag, tá er stjórin ikki beinleiðis fevndur av dagpengalógini. Um stjórin í felagnum ikki hevur, ella bert í lítlan mun hevur arbeiðsmegi aftrat sær, kann hann tekna seg til sjálvbodnu tryggingina. Stjóri í fyritøku, sum eru skipað í einum felag, og sum umframt stjóran hevur arbeiðsmegi aftrat, kann ikki tekna seg til tryggingina. Sostatt er stjórin ikki tryggjaður inntøku í sambandi við sjúku.

   Stjórin kann tó søkja um fyribils uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, men har eru aðrar treytir galdandi – eitt nú, at viðkomandi ikki skal kunna uppihalda sær á annan hátt t.d. við ogn.

   Tað skal tó gerast vart við, at stjórar í privatum fyritøkum eru fevndir av serligu COVID-19 ásetingunum í dagpeningalógini. Ásetingar eru settar at fara úr gildi tann 1. februar 2022. Landsstýrismaðurin skilir spurningarnar ikki at fevna um hesi viðurskiftini, og tí verður ikki komið nærri inn á hesi viðurskifti í hesum svarinum.

2. ***Heldur landsstýrismaðurin, at ávikavist sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í smáum fyritøkum eru nóg væl tryggjað, tá tað kemur til mista inntøku í sambandi við sjúku?***
   Landsstýrismaðurin heldur, at sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar, sum eru fevndir av sjálvbodnu tryggingini, eru væl tryggjaðir. Hjá tí sjálvstøðugt vinnurekandi, sum nýliga er byrjaður við sjálvstøðuga virkseminum, er tryggingin sera góð, tí hon gevur rætt til fulla dagpeningaupphædd frá fyrsta degi, uttan mun til inntøkuna frammanundan sjúkrafráveruni. Tað sama er galdandi fyri stjórar í smáum fyritøkum, sum kunnu tekna trygging. Tryggingargjaldið er 3.200 kr. fyri hálvárið, og dagpeningaupphæddin, sum verður veitt í sambandi við sjúku, er 960 kr. um dagin.

   Stjórar í smærri fyritøkum, sum ikki hava møguleika at tryggja seg í sjálvbodnu tryggingini hjá Almannaverkinum, hava ikki nóg góðar umstøður og eru ikki nóg væl tryggjaðir í sambandi við sjúku. Ein stjóri í eini fyritøku kann koma í støðuna, at inntøkan heilt dettur burtur, um hann verður raktur av sjúku. Ein álvarslig sjúka kann sostatt eisini blíva til ein álvarsligan fíggjarligan trupulleika hjá viðkomandi og hjá fyritøkuni.

   Dagpeningalógin tók upprunaliga støði í, at stjóri í t.d. einum partafelag kann tryggja seg við at avtala rætt til løn undir sjúku hjá sínum arbeiðsgevara. Men í fleiri smærri fyritøkum er hetta í roynd og veru ikki ein møguleiki, tí ein stórur partur av inntøkuni hjá fyritøkuni

stavar frá arbeiðinum hjá stjóranum, og smærri feløg hava ofta ikki fíggjarliga styrki at bera eina longri sjúkrafráveru hjá stjóranum. Hetta var orsøkin til, at bøtt varð um hesi viðurskifti við í lógarbroyting í 2017 við at víðka dagpeningaskipanina til at fevna um stjórar í egnum felag, sum ikki ella bert í lítlan mun hava arbeiðsmegi afturat sær. Broytingin varð ikki galdandi fyri stjórar í smærri fyritøkum við fáum starvsfólkum.

3. ***Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um endurskoða dagpeningalógina til tess at tryggja, at eingin dettur niðurímillum?***

Landsstýrismaðurin er í gongd við at fyrireika ymsar broytingar í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku. Ein av hesum broytingum er at víðka sjálvbodnu tryggingarskipanina soleiðis, at stjórar smærri fyritøkum, sum eisini hava nakað av arbeiðsmegi aftrat sær, skulu kunna tekna trygging.

Eftir vanligu reglunum í dagpeningalógini, verður dagpeningur ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála, frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. Sjálvbodna tryggingingin var av somu orsøk í 2017 bert víðkað til at fevna um stjórar, sum ikki hava arbeiðsmegi afturat sær. Ætlanin var ikki at gera eina meira generella skipan fyri stjórar men geva tí sjálvstøðugt vinnurekandi, sum eftir vanligu reglunum hevur rætt til dagpening vegna sjúku, møguleika at tryggja seg í sambandi við, at sjálvstøðuga virksemi verður lagt í t.d. eitt smápartafelag. Stjórar í størri fyritøkum hava ofta rætt til løn undir sjúku ella kunnu tryggja seg við at avtala rætt til løn undir sjúku, og ætlanin er ikki at víðka skipanina til at fevna um hesi ella onnur, ið á øðrum grundarlagi hava rætt til løn undir sjúku. Fyri stjórar í smærri fyritøkum við fáum starvsfólkum kann tað vera ein trupulleiki, at viðkomandi í ávísum førum hvørki hevur rætt til løn undir sjúku ella møguleika at tekna trygging, og arbeitt verður tí við at fyrireika ein lógarbroyting fyri henda bólk.

Ætlandi verður uppskotið lagt fyri Løgtingið fyrst í komandi tingsetu.

Tórshavn 19. mars 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður